# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Losjulimir í 1928

Í heyst kemur út bók um losjurnar í Føroyum. Losjan í Havn varð 100 ár í 2002, í tí sambandi eru persónsmyndir, sum hava almennan áhuga, men tað hevur ikki eydnast at eyðmerkja allar.

Tískil hevur blaðið fingið áheitan um at heita á lesarar, ið eru førir fyri tí, at veita vitan um teir persónar, ið ókendir eru.

Tey, sum kenna fólk á myndunum, kunnu seta seg í samband við Jákup Lindenskov á tel. 312209 ella 283808 ella skrivið. Postboks 373 FO-110 Tórshavn.



*Losjulimir avmyndaðir tá Anna Petersen úr Keypmannahavn vitjar Støt Viljan á fyrsta sinni sum ordanstalari í 1928.*
*1. ókendur, 2. ókendur, 3. Niels Jacobsen (í Stórustovu), 4. ókendur, 5. Aage Michelsen, 6. Niclas Andreasen, 7. Gerhard Dal Christiansen, 8. Herluf Hansen, 9. Herálvur Jakobsen (Hamarsá), 10. Axel Hansen, 11. Villi Hansen (hjá Sofus á Landavegnum), 12. ókendur, 13. Chr. Vilhelm Wilhelmsen, 14. Svend Wilhelmsen, 15. ókendur, 16. ókendur, 17. ókend, 18. ókendur, 19. ókendur, 20. ókendur, 21. Óli Rubeksen, 22. Elias Johansen, 23. Carl Mouritsen, 24. Bina Wilhelmsen, 25. Betty Persson (hjá Vágaheina), 26. Maja Andreasen, 27. Signhild Joensen (hjá Niels Nólsoyinginum), 28. ókend, 29. Brynhild Nielsen (hjá Niels í Heiðunum), 30. Elsa Rubeksen, 31. Bina Olsen (Strendur), 32. Robert Andrésen, 33. Hans Hansen (í Funningsstovu), 34. Thomas Askham, 35. Niels Joensen (Niels Nólsoyingurin), 36. Chr. Weihe, 37. ókendur, 38. Ludvig Olsen, 39. ókendur,*
*40. Poul Johs. Hansen, 41. Sigurd Michelsen (Lilleven), 42. ókendur, 43. Jacob Jacobsen (í Stórustovu), 44. Chr Johansen (í Rættará), 45. Petur R. Rasmussen (hjá Stinu),*
*46. Helga Hansen, 47. ókend, 48. ókendur, 49. Bergitta Poulsen, 50. Olevina Petersen (Tjørnuvíksolevina), 51. Bette Weihe, 52. Elsebeth Sofía Poulsen, 53. Kims Jacobsen (í Stórustovu). 54. Amanda Michelsen, 55. Hans Jákup Michelsen, 56. Elisabeth Hansen, 57. Elieser Hansen, 58. Anna Petersen, København, 59. Poul Johannes Hansen (Eiðis Poul Johs.), 60. Jacbina Hansen, 61. ókend, 62. Arne Arendis Olsen, 63. Peter Jensen, 64. Ella Jacobsen, 65. Anna (hjá Sørin Wilhelmsen), 66. Sigrid Hansen (Gigga hjá Tummas Jakki), 67. Jensina (Duddan) Andreasen, 68. Amanda Persson (Fjørdal), 69. Helma Rubeksen (Michelsen), 70. Elly Nielsen, 71. Elisa Haraldsen, 72 Jensia í Streymnesi, 73, Ein úr Skopun, 74. Emmy Smith (hjá Carl Bærentsen).*



## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt gleddu meg og gjørdu 85 ára dagin 23. juli so hugnaligan, takki eg hjartaliga.

*Blíðar heilsanir*
**Kathrina á Fløtunum**
**Lamba**

**Dagurin**

**12. august. Klara,** deyð í 1253, var av aðalsætt úr Assisi. Fór í fylgið hjá hinum heilaga Fransi, og eggjað av honum grundlegði hon eitt nunnukleystur og skipaði eina nunnuskipan, *klarisurnar* nevndar. Navnið er latínskt, hin *kenda* ella *skæra*.